# Kunning

Í sambandi við sølu av dósum, verður innlatingarskipan okkara dagførd.

Í tíðarskeiðnum fram til dagføringina, hevði tað lætt munandi um móttøkuna, um fløskur og dósir høvdu verið skildar í posar ella kassar.

Nýggjar fløskuautomatir, ið eisini taka móti dósum, verða settar upp í viku 39 á deildunum kring landið. Í Tórshavn verður nýggja móttøkuskipanin tó longu virkin í viku 27.

Rúsdrekkasøla Landsins tekur ikki ímóti buglaðum ella skaddum dósum, og pant verður bert latið fyri fløskur og dósir, ið eru keyptar í Rúsdrekkasøluni.



TEAM85

**Rúsdrekkasøla Landsins**
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*

# 2 spennandi størv



Gjaldstovan hevur um hendi Landsrokn-skapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:
- Felags lønarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús.

Í kreditorabókhaldinum verða rokningar til tað almenna ljóslisnar (skannaðar) og neyðugar skrásetingar verða framdar. Síðan verða rokningarnar sendar víðari í eini verkgongdarskipan elektróniskt til teir ymsu almennu stovnarnar. Kreditorarbókhaldið hevur um hendi umsitingina av øllum rokningarflowinum, t.e. at yvirvakja og alla verkgongdina frá móttøku til goldið verður. Í hesum liggur t.d. at gera feilrættingar og at kanna, hví rokningar ikki verða avgreiddar. Kreditorabókhaldið hevur eisini um hendi at svara fyrispurningum og at testa broytingar í skipanini. Í løtuni eru einir 300-400 brúkarar av rokningarverk-gongdarskipanini.

Arbeitt verður í løtuni við, at tað almenna skal hava rokningar elektróniskt.

Talan er um góðar arbeiðsum-støður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjar-málaráðnum eru góð kantinuviður-skifti.

www.gjaldstovan.fo

**Fært tú prógv av studentaskúla ella handilsskúla í summar, hava vit eitt starv til tín.**

Starvið hóskar sera væl, ætlar tú at steðga á í eitt ella tvey ár, áðrenn tú fert undir útbúgving.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- skanna rokningar
- skráseta grundardátur
- skráseta útlendsk gjaldoyru
- skráseta afturvendandi rokningar
- skráseta í høvuðsbókhaldi
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar
- leita fram skjøl og arkivera
- feilrættingar

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðirnar eru 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í bólki II. Kundi tú hugsað tær at fingið meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Onnu Højgaard, telefon 35 24 46.

**Umsókn:**
Umsóknarfreistin er 2. juli 2007.
Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu sendast til: Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir.

**Møguleiki er fyri at byrja so skjótt sum til ber.**

DIMMALÆTTING 341200

# RUKO LÁSATÆNASTA

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20



www.Sosialurin.fo